Fylgiskjal 41

javni

Tórshavn, 17.01.2020

**Hoyringssvar frá Javna**

**Løgtingsmál nr. xx/2019: Uppskot til løgtingslóg um tvingsil og onnur inntriv í sjálvsavgerðarrættin (tvingsilslógin).**

**Javni takkar fyri høvið til at gera viðmerkingar til nýggja uppskotið. Viðmerkingarnar niðanfyri eru óbroyttar í mun til viðmerkingarnar til lógaruppskotið í 2018.**

§4

Er samansetingin av tvingsilsnevndini nøktandi? Í nógvum førðum skal metast um mál, har námsfrøðilig atlit hava stóran týdning. Tí halda vit, at námsfrøðin átti at verið betri umboða í nevndini.

§7

Hurðaupplatingarskipanir mugu vera soleiðis háttaðar, at tær tryggja, at persónur og sambúgvar sleppa út, skuldi t.d. eldur komi í. Hetta má staðfestast í lógini.

§13

At flyta ein persón til annan bústað ímóti hansara vilja er eitt sera álvarsligt stig, og tryggjast má í lógartekstinum, at ein flyting av slíkum slagið má verða allar síðsta loysn.

§18

At heilsa persónsins ikki er í vanda av inntrivinum eigur eisini at umfata sálarliga heilsu.

§22

Navni á persóninum, ið setti inntrivið í verk eigur at standa á oyðiblaðnum.

Stk 3: Um eitt inntriv verður framt fyrst í einum mánaða kann ganga ein heilur mánaði, áðrenn nakar myndugleiki fær boð um hetta, og enn 10 dagar áðrenn tvingsilsnevndin fær fráboðan. Síðan kunnu ganga upp til 30 dagar áðrenn nevndin tekur málið upp. Sostatt kunnu ganga gott tveir mánaðar, áðrenn

avvarandi fáa kunnleika til inntrivið, og er tað sera leingi. Her átti at verið sama galdandi sum í stk 4.

Vegna Javna

Fía Petersen, forkvinna